gult6 cyan6 magenta6 svart6



## Skúlin í Sumba undir slóðbrótandi virksemi

**– Skúlin í Sumba er tann fyrsti í Føroyum, sum bjóðar undirvísing í nýggjum radiosamskifti, sum verður krav um stutta tíð**

SAMSKIFTI
*Áki Bertholdsen*

Í Sumba hava tey víst, at eisini úti á bygd í Føroyum ber til at fara undir slóðbrótandi virksemi.

Skúlin í Sumba er nevniliga fyrsti í skúlin Føroyum farin undir eina spildurnýggja útbúgving.

Tað er kvøldskúlin í Sumba, sum er farin undir eina útbúgvin í einum nýggjum slagi av radiosamskifti.

Talan er um tað, ið verður nevnt SRC, sum stendur fyri Short Range Certificate.

Enn eru heldur ikki sjómannaskúlarnir í Føroyum farnir undir hesa útbúgvingina. Yvirhøvur er tað enn bara í heilt fáum londum í heiminum, at tey eru farin undir hesa útbúgvingina, so sumbingar eru ikki bara slóðbrótararar í Føroyum, teir ganga undan í heimshøpi.

SRC er tað slagið av samskifti, ið kemur fyri gamla VHF-radioprógvið og um heilt fá ár verður tað krav, at allir bátar, størri enn t.d. áttamannafør, skulu hava hesa skipanina.

Skulu vit válka okkum eitt sindur í teknikki, er SRC partur av navigatiónsskipanini, GMDSS í stendur fyri Global Maritime Distress and Safety System, og byggir á DSC-skipanina. DSC stendur fyri Digital Selective Calling.

VHF-DSC vil í stuttum siga at bátar og skip, um tey koma í neyð, bert skulu trýsta á ein knøtt á VHF-tólinum, so sendur tólið neyðarkall sjálvvirkandi, sum Tórshavnar Radio og bátar og skip, ið hava somu skipan, síðani hoyra.

Er VHF-tólið íbundið ein GPS-ara so boðar tólið eisini frá knattstøðuni, tá ið tað sendur neyðarkall.

### Verður krav

Tað er Petur Dahl Nolsøe, fjarritari úr Vági, sum hevur undirvíst í SRC samskifti í skúlanum í Sumba.

Hann sigur, at hetta er samskifti fyri teir, sum hava lítlar bátar, eitt nú útróðrarbátar og alibátar.

Um nøkur heilt fá ár verður tað krav, at allir smábátar, sum eru størri enn t.d. eitt áttamannafar, skulu hava hesa skipanina.

Petur Dahl Nolsøe sigur, at tað eru 11 mans úr Vági og úr sumba, sum hava verið á skeiðum.

Hann hevur áður undirvíst í VHF bæði á Leiti og í Porkeri. Men nú nýggja skipanin kemur, varð hann spurdur, um hann ikki kundi hava skeið í tí eisini. Skeiðið varð lagt í Sumba, tí haðani eru teir flestu av næmingunum

Próvtøkan verður leygardagin. Tá verður tað umboð fyri Fjarskiftiseftirlitið, sum verður próvdómari.



*Petur Dahl Nolsøe hevur áður undirvíst í radiosamskifti, men nú er hann farin undir slóðbrótandi virksemi á hesum øki, saman við skúlanum í Sumba. Annars munnu tey, sum sigla við Smyrli kennast við hann, tí har hevur hann sína dagligu gongd*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Ingeborg Vinther: Vænta eitt hart stríð



*Í gjáramorgunin var fyrstu ferð á hesum sinni, at Arbeiðsgevararnir og arbeiðarafeløgini hittust til samráðingar um nýggjan sáttmála. Samráðingarnar eru í hvussu so er byrjaðar vinarliga. Á myndini bjóðar arbeiðsgevaraformaðurin, Vilhelm Johannesen, Ingeborg og hinum, kaffi*

*Mynd: Jens K. Vang*

**– Vit skulu minst hava somu lønarhækking, sum limirnir í Starvsmannafelagnum fingu, sigur Ingeborg Vinther, nú samráðingarnar við Arbeiðsgevaranar byrjaðu í gjár**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Eg vænti, at tað verður eitt hart stríð. Men vit skulu minst hava somu lønarhækking, sum limirnir í Starvsmannafelagnum hava fingið frá tí almenna.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forvkinna í Føroya Arbeiðarafelag, nú skjøtil er settur á samráðingarnar við arbeiðsgevararnar um ein nýggjan sáttmála.

Partarnir høvdu sín fyrsta samráðingarfund í hølunum hjá Vinnuhúsinum í Havn kl. 10 í gjáramorgunin.

Men Ingeborg Vinther væntaði ikki, at tað fór at henda tað stóra tá.

Vit hava ikki fingið orðið á partarnar aftur eftir samráðingarnar, men Ingebor Vinther væntaði ikki at annað fór at henda á tí fundinum enn, at partarnir fóru at leggja síni sjónarmið fram.

### Minst 12% í lønarhækking

Ingeborg Vinther vil tískil ikki enn siga nakað um, hvørji krøv, arbeiðararnir fara at leggja fyri arbeiðsgevararnar hesuferð.

Hon vil heldur ikki siga nakað um lønarkrøvini, sum verða hesuferð, tí tey verða løgd fyri arbeiðsgevararnar seinni.

Men hon ásannar, at sáttmálin, sum longu er gjørdur ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, fer at ávirka samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum.

– Tá ið tann sáttmálin varð gjørdur, varð samstundis støðið lagt. Soleiðis plagar tað at vera, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at samanlagt hava limirnir í Starvsmannafelagnum fingið eina lønarhækking uppá yvir 12%, tá ið allir snøklar eru taldir við.

– Men keypiorkan hjá fólkið er versnað so nógv hesi bæði seinastu árini, at skal ein arbeiðari ikki verða verri fyri, enn hann var, áðrenn hesi sáttmálin var gjørdur, skal tímalønin hækkað 15-20 krónur hesuferð, so nógvu eru prísirnir hækkaðir.

Og hóast Ingeborg Vinther er ikki vil siga, hvørji lønarkrøvini verða, sigur hon, at tey skulu minst hava somu lønarhækking, sum limirnir í Starvsmannafelagnum hava fingið, tvs, gott 12%.

– Hvussu samráðingarnar annars fara at ganga, dugir Ingeborg Vinther ikki siga, men hon dylir kortini ikki fyri, at hon fryktar fyri einum harðum stríði.

### Saman við kvinnunum í Havn

Í hesum samráðingunum verður tað Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum samráðast í felag við arbeiðsgevararnar.

Arbeitt varð annars fram ímóti, at hesuferð skuldu øll feløgini, tvs., Føroya Arbeiðarafelag, bæði feløgini í Klaksvík og bæði feløgini í Havn, ganga saman og samráðast í felag við Arbeiðsgevararnar.

Men Ingeborg Vinther sigur, at feløgunum úr Klaksvík hoyrdi Føroya Arbeiðarafelag ongantíð frá aftur og Havnar Arbeiðsmannafelag bar heldur ikki til at semjast um eitt felags grundarlag at samráðast á.

Ingeborg Vinther vil ikki út í æsir við, hví Havnar Arbeiðsmannafelag ikki er við.

Men tað er ongin loyna, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag sita ikki væl um sátt. Seinast hevur stríðið um arbeiðsmenninar í Kollafirði oyst enn meiri bensin á tað bálið. Arbeiðsmenninir í Kollafirði hava leingi verið limir í Føroya Arbeiðarafelag, men nú Kollafjørður kom upp í Tórshavnar Komunu, vil Havnar Arbeiðsmannafelag hava teir til sín.

Sostatt fara Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag einaferð enn at samráðast saman. Tað gjørdu feløgini bæði eisini, seinast sáttmálasamráðingarnar vóru, og Ingeborg Vinther letur sera væl at tí samstarvinum.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



POLITIKKUR & SAMFELAG

# Nýval kemur ikki upp á tal



*Løgmaður ætlar sær ikki so mikið, sum at umhugsa at fylgja ráðunum frá samgongufelaganum, Helenu Dam á Neystabø, um at skriva út nýval*

**Løgmaður ætlar sær ikki at fylgja tilmælinum frá samgongufelaganum, Helenu Dam á Neystabø, um at umhugsa nýval. Anfinn Kallsberg metir politisku støðuna vera trygga**

SAMGONGUÓSEMJA
*John Johannessen*

Stendur tað til løgmann, verður einki løgtingsval fyrr enn um eitt ár. Løgmaður ætlar sær ikki at fylgja ráðunum frá Helenu Dam á Neystabø um at umhugsa nýval.

Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisflokksins, segði við Sosialin fyri páskir, at stríðið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin í samgonguni er vorðið til eina landaskomm, har báðir stóru samgonguflokkarnir bera seg at sum smábørn. Helena Dam á Neystabø, sum sjálv er partur av samgonguni, helt tí, at løgmaður eigur at umhugsa, um føroyski veljarin skal sparast fyri einum valári.

### Skilir ikki Helenu

Men Anfinn Kallsberg, løgmaður, skilir ikki, hví Helena Dam á Neystabø kemur við slíkum útsagnum.

– Tað, sum gongur fyri seg í samgonguni, er at ójavnin millum vinstra og høgra í føroyskum politikki kemur til sjóndar, tá tað um búskaparpolitikk ræður. Helena kann ikki vænta sær, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin skulu vera púra samdir um alt innan búskaparpolitikk. Heldur hon tað, hevur hon lært lítið í politikki, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg sigur, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin yvirodnað eru samdir um, hvussu vit skulu menna føroyska búskapin til ein sjálvberandi búskap fyri einar sjálvstøðugar Føroyar. Men, at tær ósemjur, ið koma fram í fjølmiðlunum, eru púra náttúrligar í einum samstarvi millum Fólkaflokkin til høgru og Tjóðveldisflokkin til vinstru.

Tað kemst kortini ikki uttan um, at stórar politiskar ósemjur hava verið innanhýsis í samgonguni í langa tíð. Og fleiri av hesum ósemjum hava verið so mikið stórar, at tað hevur verið um reppið, at tær hava forkomt samgonguni. Men løgmaður heldur kortini, at politiska støðan í Føroyum er trygg, og at samgongan fer at halda.

### Arbeiðið heldur fram

Heldur ikki heldur løgmaður, at nógvu ósemjurnar í samgonguni kunnu forða fyri, at samgongan kemur víðari við fullveldismálinum og øðrum málum, hetta árið, sum eftir er av valskeiðinum.

– Vit hava fingið nógv frá hondini hetta samgonguskeiðið, og eg ivist ikki í, at vit eisini fara at fáa nógv frá hondini afturat, eru greiðu boðini frá Anfinni Kallsberg, løgmanni.

Anfinn Kallsberg vísir á, at um Helena Dam á Neystabø ynskir nýval, kann hon royna at fáa uppskot um nýval reist í tinginum. Hann ætlar sær í øllum førum ikki so mikið, sum at umhugsa at skriva út nýval.

## Sandoyarætlanin bjargaði Sandoynni

**Almenna Sandoyarætlanin hevur skapt framburð aftur í Sandoynni síðani búskaparkreppuna. Økismenningarbólkurin mælir út frá hesum til almennan fíggingarstovn at menna útjaðaran**

ØKISMENNING
*John Johannessen*

Skeiva gongdin í Sandoynni eftir búskaparkreppuna vendi, tá bæði flakavirkini lótu upp aftur orsakað av sonevndu Sandoyarætlanini.

Hetta var ein ætlan, har tað almenna fór inn og stuðlaði menning av vinnulívinum í oynni.

Og júst hetta metir økismenningarbólkurin, sum fyri stuttum handaði landsstýrinum økismenningarálitið, vera bjargingina hjá Sandoynni.

Bólkurin vísir á, at tað hevur gingið støðugt framá í Sandoynni síðani flakavirkini lótu upp aftur, og er hetta eisini nakað, sum sæst aftur í lønarhagtølunum og í arbeiðsloysinstølunum fyri oynna. Í økismenningarálitinum verður víst á, at talið á fólki við fiskavøruídnaði sum høvuðsvinnu vaks frá 10 fólkum í 1995 til 149 í 1999. Hetta, heldur bólkurin, greitt vísir týdningin av Sandoyarætlanini.

### Neyðugt við almennari fígging

Tað gekk long tíð at fáa gongd á aftur í Sandoynni. Og eina av orsøkunum til hetta, heldur økismenningarbólkurin vera vantandi fíggingarumhvørvi.

»Talið á verkætlanum tykist ikki hava trotið í Sandoy, men trupulleikin hevur verið at fáa fígging til hesar verkætlanir«, sigur økismenningarbólkurin í áliti sínum.

Bólkurin vísir í hesum sambandi á, at ein av vinnulívsmonnum í Sandoynni, sum bólkurin hevur tosað við, segði frá, at tað var eitt beinleiðis krav frá peningastovnunum í miðstaðarøkinum, at hann skuldi leggja fyritøku sína í Havn ella nærhendis Havnini, fyri at fáa fígging frá teimum. Vinnulívsmaðurin vildi tó ikki eftirlíka hesum boðum, og legði hann tí virki sítt í Sandoynni. Avleiðingin var, at hann onga fígging fekk frá peningastovnunum.

Hetta, heldur økismenningarbólkurin, ber boð um, at tørvur er á einum fíggingarstovni ella grunni, ið serliga tekur inn í myndina økismenningaratlit, tá hann veitir fígging.

## Ósemjan er spæl fyri gallarínum

**Sambært Høgna Hoydal, gongur arbeiðið í landsstýrinum væl. Hann vísir á, at ósemjan í samgonguni er spæl fyri gallarínum**



SAMGONGU-ÓSEMJA
*John Johannessen*

Stóru orðini í fjølmiðlunum og á tingsins røðarapalli um ósemjur í samgonguni eru bert spæl fyri gallarínum.

Hetta heldur Høgni Hoydal, varaløgmaður og formaður Tjóðveldisfloksins.

Høgni Hoydal vísir á, at samstarvið í landsstýrinum gongur væl, hóast politiska støðan kann tykjast kaotisk fyri almenninginum.

Kortini viðgongur Høgni Hoydal, at tað eru ávísar ósemjur, ið skapa órógv. Millum hesar er positiva støða Fólkafloksins til uppskotið hjá Henriki Old, um at lækka avgjaldið á bensini. Men sambært Høgna Hoydal, arbeiðir samgongan í løtuni við at loysa hetta mál innanhýsis.

At Fólkaflokkurin er komin við ógvusligum viðmerkingum til semjuna, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, gjørdi við Starvsmannafelagið, metir Høgni Hoydal bert vera enn eitt dømi um spæl fyri gallarínum.

– Tað, sum nú er avgerandi, er at vit halda fram í samgonguni, og at vit fáa hildið brimgarðin um landskassan, eins væl og vit fáa sett á stovn ein búskapargrunn og fáa uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks samtykt, sigur Høgni Hoydal.

## Henrik vil hava betri telesamband

**Henrik Old vil hava at vita frá Bjarna Djurholm, nær útjaðarin fær somu kor innan telesamskifti, sum miðstaðarøkið**



FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Nær kunnu vit vænta, at allir landsins borgarar fáa teletænastu á sama høga stigi, sum felagarnir í miðøkinum?

Soleiðis ljóðar skrivligi fyrispurningurin frá Henriki Old úr Javnaðarflokkinum til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin vísir Henrik Old á, at heilar bygdir, sum til dømis Dalur, enn ikki hava fastnetsambandið í lagi, men mugu í felag klára seg við eina telefonlinju. Heldur ikki ber til hjá fólki í Dali at fáa samband yvir GSM netið.

Henrik Old vísir eisini á, at internetsambandið er vánaligt í stórum parti av land-inum, og at GSM-tænastan ikki er nøktandi í økjunum uttan fyri miðøkið.

– Tað kann ikki vera rætt, at fólk í til dømis Sandoynni og Suðuroynni skulu koyra langa leið fyri at fáa samband við umheimin, sigur Henrik Old.